NÁM

# Brodera eitt bókamerki



**Tilfarslisti:**

20 cm av broderítoyi til millumverk.

1 broderínál uttan odd

Reytt, grønt og kirsuberjareytt (cerise) broderítógv

Hvítt filt

**At brodera krosssting:**



Finn miðjuna á toynum og brodera mynstur 1 við tveimum træðrum av reyðum umleið 1½ cm frá kantinum. Fest endan á ranguni.





| | | | | | | |
|---|---|---|---|---|---|---|
| | | | X | | | |
| | | x | X | x | | |
| | x | x | X | x | x | |
| x | x | x | X | x | x | x |
| | x | x | X | x | x | |
| | | x | X | x | | |
| | | | X | | | |
| | | | | | | |
| | | | | | | |
| | | | | | | |
| | | | | | | |
| | | x | | x | | |
| | x | x | | x | x | |
| | | | | | | |
| | x | x | | x | x | |
| | | x | | x | | |
| | | | | | | |
| | | | | | | |
| | | | | | | |
| | | | | | | |

Mynstur 1, til miðjuna á bókamerkinum, broderað við reyðum

Brodera síðan mynstrini á síðunum við grønum og kirsuberjareyðum.

| | | | |
|---|---|---|---|
| o | o | | |
| o | o | | |
| | | o | o |
| | | o | o |
| o | o | | |
| o | o | | |
| | | o | o |
| | | o | o |
| o | o | | |
| o | o | | |
| | | o | o |
| | | o | o |
| o | o | | |
| o | o | | |
| | | o | o |
| | | o | o |

Mynstur 2 ,(á síðunum ovast og niðast), broderað við grønum

| | | | | | | |
|---|---|---|---|---|---|---|
| | | x | | x | | |
| | x | x | | x | x | |
| | | | | | | |
| | x | x | | x | x | |
| | | x | | x | | |
| | | | | | | |
| | | | | | | |
| | | x | | x | | |
| | x | x | | x | x | |
| | | | | | | |
| | x | x | | x | x | |
| | | x | | x | | |
| | | | | | | |
| | | | | | | |
| | | x | | x | | |
| | x | x | | x | x | |
| | | | | | | |
| | x | x | | x | x | |
| | | x | | x | | |
| | | | | | | |
| | | | | | | |

Mynstur 3, (úti á síðunum - mitt á), broderað við kirsuberjareyðum.

Seyma við sikk-sakk seymi fram við ovara kanti og legg (boygg) hann inn móti ranguni og seyma hann fastan við beinum seymi.



Frynsa niðara kantin umleið 1½ cm og seyma við sikk-sakk seymi framvið kantinum.



Klipp eitt stykki av filti umleið 6½ cm x 15½ cm, soleiðis at tað fjalir næstan alla ranguna (filti skal vera um 3 mm innan fyri kantarnar).



Legg filtið á ranguna og seyma allan vegin runt við beinum seymi.

Góðan arbeiðshug 😊